# Lena spældi fyri 4 milliónum pólakkum



**Konsertin hjá Lenu á Sopot festivalinum í Pólandi varð send á almennu pólsku sjónvarpsrásini, og mett verður at 4 milliónir hugdu at henni**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrst í hesum mánaðinum spældi Lena á Sopot festivalinum í Pólandi. Á heimasíðu síni sigur føroyskt/kanadiska songkvinnan, at tað var sera stuttligt at luttaka á festivalinum. Eini 5000 fólk vóru á konsertini, ið eisini varð send í polskum sjónvarpi. Tað var almenna sjónvarpsrásin TVP1, ið sendi konsertina og mett verður at eini 4 milliónir pólakkar hugdu at henni.

Seinni í hesum mánaðanum fara Lena og Niclas til Los Angeles at ljóðblanda nýggju fløguna, ið songkvinnan hevur arbeitt við seinastu mánaðarnar. Í hesum sambandi spælir Lena nakrar intimar solokonsertir í Los Angeles í 25. august í LIVE AT THE LOUNGE og 29. august í Genghis Cohen.

Tað er kendi amerikanski blandarin Ryan Hewitt, ið ljóðblandar fløguna í Encore Studios. Ryan Hewitt verður mettur at vera ein av mest eftirspurdu ljóðblandarum í heiminum í løtuni, eftir at hann ljóðblandaði dupultfløguna Stadium Arcadium hjá Los Angeles bólkinum Red Hot Chili Peppers. Áðrenn Lena kemur heim aftur fer hon ein túr til hitt heimlandið Kanada og spælir eina konsert 9. september í Media Club í Vancouver.


## TIL SØLU

Hugnalig sethús við stórum og vøkrum urtagarði við Sundsveg 9 , í Tórshavn (matr. nr. 1457a).



**Húsini:**
Húsini eru bygd fyrst í fimti´árunum. Tey eru snøgg og væl røkt.

**Uttan:**
svartur timburklædningur, hvít sprossavindeygu og grøn aluminiumstekja. Í húsunum eru 5 sovirúm og baðirúm í erva, í neðra gangur, køkur, 2 stovur umframt útistova við útgongd til hátún. Í somu hædd er úthus við 2 rúmum, har annað er vaskirúm. Húsini eru í 2 hæddum umframt kjallara. Í neðra umleið 70 $m^2$ og í erva umleið 70 $m^2$ við høgum trimpli umframt úthús 25 $m^2$ til víddar. Grundøkið er 2984 $m^2$.
Pláss er fyri fleiri bilum.

**Urtagarðurin:**
Uttanfyri er stórur urtagarður við gøtum, hugnaligum sólkrókum, nógvir runnar og trø og grasvøllur. Løkur rennur ígjøgnum økið vestanfyri.

**Økið:**
Húsini liggja í hugnaligum og friðarligum umhvørvi, við góðum sólargangi og góðum útsýni - millum Sortudýkið og Berjabrekku. Tað er frítt rundan um ognina. Her er stutt til barnagarðar, skúlar, ítróttarøki, matvøruhandlar, lækna og bakara. Busssambandið er gott. Teinurin oman í býin tekur um 15 min. at ganga.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við Hans Trygva Teirin, tlfl. 225045 - Advokatvirkið, Skansavegur 1, 100 Tórshavn.


# Ókeypis Sjómannadagur

**Klaksvík:** Annað árið á rað verður ksipað fyri serstøkum Sjómannadegi í stóra fiskivinnubýi okkara.

Hesa seinastu tíðina hava fyrireikararnir lagt stóra orku í at fáa eina so fjølbroytta skrá til vega sum yvirhøvur gjørligt.

Tað er líkt til at klaksvíkingar ikki eru bangnir fyri at skipa fyri stórum tiltøkum. Er tað nakað sum hevur sermerkt Klaksvík í ár eru tað tey stóru tiltøkini sum her hava verið - umfatandi skráin, tá Norðoyatunnilin lat upp, Norðoyastevnan, Summarfestivalurin og nú Sjómannadagurin.

Skráin fyri sjómannadagin er bæði serstøk og spennandi, og hevur nakað av bjóða øllum teim vitjandi, sum fara at vitja í Klaksvík hesar komandi dagarnar.

Tað sum kanska er mest serstakt við skránni er, at so at siga øll tiltøkini eru ókeypis. Við hesum vilja fyrireikararnir siga og vísa, at eingin skal halda seg aftur at koma við til stóra tiltakið av peningaligum orsøkum.

Teir hava eisini gjørt vart við seg kring alt landið. Í gjár varð nevniliga ein serstøk útgáva av Norðlýsinum borin út í hvørt hús í landinum. Nú nýtist ongum at siga, at viðkomandi ikki veit hvat verður á skránni í Klaksvík um vikuskiftið.

Í hesi serútgávuni siga fyrireikararnir soleiðis:

– Vit halda, at føroyingar í minsta lagi einaferð um árið eiga at seta okkara sjóvinnufólk, sjóvinnu og okkara størstu útflutningsvøru í hásætið. Tí eigur ein sjómannadagur sum hesin at seta sær stór mál.

– Føroyar eru eitt lítið land, ið liggur mitt úti í Norðuratlantshavinum. Júst eins og okkara grannatjóðir, so hava vit livað av tí sum havið hevur givið og hava vit altíð sett okkara álit á fiskivinnuna. Men skulu vit verða við í hesari kapping, so er umráðandi ikki at smæðast burtur á tí altjóða pallinum, men alla tíðina seta sær stór mál. Og hví skulu vit ikki tað?, siga fyrireikararnir í vælkomu síni til tiltakið.

Fyrstu tiltøkini í ársins sjómannahaldi byrjaðu longu í gjárkvøldið. Hildið verður fram í kvøld, men leygardagin eru flestu tiltøkini á skránni.


LM ELECTRIC

## Rakstrarleiðari til LM Electric

Søkt verður eftir einum ágrýtnum fólki, ið hevur áhuga, hugflog og initiativ til at vera við til at menna LM Electric.

**Vit kunnu bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði. Vit hava gott 40 fólk í starvi, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Tú fært gott innlit í nógv viðurskifti, so sum kundatænasu, fyriskipan og projektstýring. Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Starvið**
Felagið hevur stórar avbjóðingar fyri framman. Rakstrarleiðarin skal saman við leiðslu felagsins seta mál fyri deildina og vera við til at gjøgnumføra hesi. Fremsta uppgávan verður at samskipa arbeiðið á deildini.

Høvuðsuppgávurnar eru:
· Samskifti við viðskiftafólk og starvsfólk.
· Dagligt leiðsla av handverkaradeildini.

**Krøv til starvið**
Tú mást hava áhuga fyri økinum, og best er, um tú hevur royndir frá líknandi arbeiði. Tað er ein fyrimunir um tú:
· Ert vanur at skipa fyri
· Ert fyrikomandi og kundavinaligur.
· Ert el-innleggjari ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
· Hevur góð samstarvsevni.
· Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
· Ert arbeiðssamur, røkin og hugagóður til hetta arbeiði.

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, tínar starvsfelagar og fyritøkuna.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Paula Hofgaard (ph@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. LM Electric, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25. august 2006.



TEAM85

p/f LM Electric Hoyvíksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo